tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Signar og hini

Oddagrein

Landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum hevur verið heitasta evnið í fjølmiðlunum seinastu vikuna, og eftir middag ígjár frættist, at landsstýrismaðurin fór frá fyribils, meðan málið um embætisførslu hansara í samband við gjaldføristrupulleikarnar hjá Sjónvarpi Føroya verður kannað.

Alt fleiri tíðindi seinastum samdøgurini benda á, at tað eru tær yngru kreftirnar í Tjóðveldisflokkinum, sum vildu hava Signar á Brúnni frá sum landsstýrismann. Og so kunnu vit spyrja hví? Vilja tær yngru kreftirnar hava alt valdið, ella vilja tey hava ein fullkomiliga óplettaðan Tjóðveldisflokk, nú fullveldið er fyri framman?

Tíðindi ígjár og fyrradagin vildu vera við, at landsstýrið sum so vildi ikki, at Signar á Brúnni legði frá sær sum landsstýrismaður, hóast einstakir landsstýrismenn einki høvdu ímóti, at Sigar á Brúnni fór niðan á Hoyvíksvegin at pakka skjøl og pappír niður í kassar.

Tað kann hugsast, at orsøkin til, at landsstýrismenn ikki vilja hava, at Signar á Brúnni verður koyrdur frá ella fer frá sjálvboðin er hon, at fleiri landsstýrismenn hava lík í lastini. Tann nýggja frágreiðingin hjá landsgrannskoðaranum er jú rættiliga avdúkandi fyri fleiri landsstýrismenn.

M. a. verður staðfest í frágreiðingini, at til almannamál vórðu 30 milliónir krónur brúktar meiri enn játtan var til. Talan var eisini um lógarbundnar útreiðslur, men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vildi, sambært frágreiðingini ikki seta peningin á eina eykajáttanarlóg. Hvussu meirnýtslan síðani er legaliserað er enn ógreitt.

Somuleiðis visti neyvan nakar av, at Landsverkfrøðingurin brúkti átta milliónir meiri enn heimild var fyri í 1998, men hinvegin var kent, at Strandferðslan hevði eina stóra meirnýtslu í 1998, og fekk pening úr gjaldføri landskassans.

Tað var taða sama sum hendi viðvíkjandi sjónvarpinum. Landsstýrismaðurin útvegaði SVF pening úr gjaldørinum hjá landskassanum eftir leiðbeing frá embætismonnum í Fíggjarmálastýrinum og Undirvísingar- og mentamálastýrinum. Hetta var kortini eftir, at fíggjarnevndin hevði noktað fyri at viðgjørt eina umsókn um eykajáttan.

Ein grundgeving hjá Tjóðveldisflokkinum at fáa landsstýrismannin settan frá var, at landsgrannskoðarin sigur, at stýrisskipanarlógin er brotin.

So er spurningurin, um hinar atfinningarnar og viðmerkingarnar hjá landsgrannskoðaranum eisini benda á, at stýrisskipnarlógin er brotin í teimum førunum? Ella um ein stovnur og landsstýrismaður bara kunnu lata standa til og lata stovn yvirtrekka og ikki halda játtanina. Tí eftir støðuni ígjár at døma, er spurningurin um tað fær avleiðingar.

Sosialurin

Viðmerking:

Ein dagur av jørð ella ein rakstur aftrat

Hann ætlaði bert at keypa ein jarðarteig aftrat soleiðis, at livi líkindini gjørdust heldur betur. Eingin ivi var um tað, men nú ráddi um at finna rætta vinin, ið vildi selja ella geva ein líkinda teig.

Sanniliga kemur hann fram á ein mann, ið býður honum tað av jørð, ið hann megnar at ganga um, áðrenn dagsett er. Hetta var ikki eiti á tilboð.

Monnum líkt, dróg hann andan djúpt og helt avstað. Her var fongur at fáa.

Sum tey flestu munnu vita, og onnur gita, gekst honum ikki so væl. Hann kom sær sjálvum undir sprongdargongu. Væntaði miklan fong, men fall deyður á vali áðrenn sólin setti. Hetta lokkandi til - boðið kostaði honum lívið. Ein dýrur blokkur.

Sorgarsøgur eru eisini her á landi um fiskimenn, ið ætlaðu sær at landi á kvøldi við nærum fullsettum báti. Men tá ið siglast skuldi helt onkur, at nakað mundi kunna dragast aftrat, ein rakstur kunnu vit leggja aftrat. Hetta leggið kostaði teimum lívið. Teir ovfyltu bátin. Tá er lítið vunnið. Tá royndist betur at verið nøgdur við eitt sindur minni.

Føroyingar standa nú á fríum vølli ella flóta á opnum havi, og skulu til at velja. Eitt týdningarmikið val,

Úti í havsbrúnni ella heilt úti undir vaðingini hongur ein posi. Tað frættist, at hann er fullur av gloypibitum ella á tremur av milliónum av krónum í donskum peningi. Men ð ljóðar, at summir av hesum gloypi-

bitum eru fyltir innan við húkum soleiðis, at um tú svølgir ein tílíkan, gerst tú fastur, tí teymur er á hvørjum húki. Tú sleppur ikki leysur aftur.

Hinvegin sigast milliónirnar hava tann eginleika, at velur tú tær, vil tú bara hava meira, og sleppur ikki úr stað; tú kemur ikki longur fram á vegin, og stendur eftir við tí tómu tægu. Eitt torført val.

Nei. Nu er tað so, at føroyingar og danir eru farnir í samráðingar um framtíð okkara. Teir byrjaðu ein fríggjadag. Hvat skuldi ein vænta?

Men líkamikið. Nú er fyrri ella fyrsti hálvleikur spældur. Danir løgdu í vaðið við snarálopum og hørðum taklingum, men sum vera man, Anfinnur fylti væl uppí málið, so bólturin kom ongantíð í netið.

Fyrri hálvleikur endaði sostatt við, at danir fingu gula kortið fyri ovhart spæl, og føroyingarnir byrja tískil annan hálvleik við hornasparki. Hetta verður 6. apríl.

Sjúrður Þoulsen

Føroya Landsstýri

Stílað: Signari á Brúnni, landsstýrismanni í undirvísingar- og mentamálum.

Undirritaðu skúlaleiðarar í Eysturoynni, sum umboða 1700-1800 næmingar, hava viðgjørt støðuna, nú sáttmálasettu lærararnir hava verið í verkfalli síðan 8. mars.

Av tí at sáttmálasettu lærararnir undirvísa í miðal umleið ein triðing av pultstímunum, verður undirvísingin skerd so munandi, at skúlin als ikki virkar sum undirvísingarstovnur. Fleiri flokkar hava lítla og onga undirvísing fingið, síðan verkfallið byrjaði.

Heldur hetta lagið fram í langa tíð afturat, verður drúgt at byggja tað uppaftur, sum nú verður brotið niður.

Í løtuni er støðan í skúlanum ótolandi, og tí verður inniliga heitt á tygum sum landsstýrismann í skúlamálum og ábyrgdarhavandi at taka stig til, at málið verður loyst **beinanvegin.**

Fuglafjørður, tann 23. mars 2000.

Fuglafjarðar skúli, Súni í Hjøllum
Leirvíkar skúla, Ólavur Sjúrðarberg
Gøtu skúli, Hans Mourits Foldbo
Runavíkar kommunuskúli, Osmund Lamhauge
Tofta skúli, Marita Dalsgaard
Stranda skúli, Richard Johansen
Skála skúli, Súni Kristiansen
Oyndarfjarðar skúli Hallur Ellingsgaard
Funningsfjarðar skúli, Emil Jacobsen
Funnings skúli, Tórhild Bjarkhamar
Gjáar skúli, Jan Thomsen
Eiðis skúli, Vagn Foldbo
Norðskála/Oyra skúli, Arnold Joensen
Felagsskúlin á Oyrarbakka, Hans Erland í Brekkunum

Yvirlýsing frá 7 mannabólkinum

Umboðandi umleið 32 fakfeløg sigur 7-mannabólkurin frá, at meðan Føroya Lærarafelag er í arbeiðsstøðgi taka limir í fakfeløgunum ikki næmingar frá fólkaskúlanum í starvsvenjing.

Tórshavn 23.3.00.

Sjúkrasystrafelag Føroya
Starvsmannafelagið
Havnar Handverkarafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag
Havnar Arbeiðsmannafelag
Føroya Arbeiðarafelag

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæra mamma, vermamma, omma og systur

ALISA HJELM
Klaksvík

doyði og varð jarðað.

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað. Tøkk fyri troystarrík orð, blómur, kransar og uppringingar og til tykkum øll, sum hjálptu til á mangan og ymiskan hátt.

Ein hjartans tøkk fyri peningagávur til Zarepta.

Familjunnar vegna

børnini

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu í stóru sorg okkara, tá kæri sonur, beiggi, svágur, mammubeiggi og vinur okkara

TERJI NIELSEN
Sumba

brádliga andaðist og varð jarðaður.

Tøkk tit mongu, ið vóru í kapellinum í Keypmannahavn. Tøkk til Elsu Funding, prest, fyri troystarrík orð í heiminum og í kirkjuni. Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.

Tøkk fyri telegrammir, tit sum ringdu, sendu blómur og kransar og fyri gávu til Missiónshúsið. Tøkk øll tit, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Fyri tey avvarðandi

Harda og Daniel Jacob

Signar farin úr sessinum

Landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum heitti í gjár á løgmann um at verða loystur úr landsstýrissessinum. Høgni Hoydal umsitur nú málsøki hansara



JOHN JOHANNESSEN

Klokkan trý korter til tvey seinnapartin í gjár - tá tingfundurin varð settur - las tingformaðurin upp skriv frá Signari á Brúnni, landsstýrismanni, har hann heitti á løgmann um fyribils at verða loystur úr landsstýrissessinum, meðan spurningurin um embætisførslu hansara verður kannaður.

Signar á Brúnni skýtur í brævi sínum upp, at Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, tekur yvir málsøki síni.

Løgtingsformaðurin las eisini bræv upp frá løgmanni. Í brævinum sigur løgmaður seg ganga umbønini á møti, og boðaði hann frá, at Signar á Brúnni var loystur úr starvinum beinan vegin. Somuleiðis boðaði løgmaður frá, at Høgni Hoydal nú skal umsita undirvísingar- og mentamál.

Aftur tingmaður

Signar á Brúnni var á valinum í 1998 valdur inn á ting. Men avgerðin um, at hann skuldi gerast landsstýrismaður, gjørdi, at hann aldri tók við hesum tingsessi. Men Signar á Brúnni er nú vanligur tingmaður, eins og hann var frá 1994 til 1998. Tingsessin tók hann beinan vegin, løgtingsformaðurin hevði boðað frá, at Signar á Brúnni ikki longur var landsstýrismaður.

At landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum aftur er tingmaður hevur ikki bert havt avleiðingar fyri Signar á Brúnni, men eisini fyri ein annan av limum Tjóðveldisfloksins.

Tórbjørn Jacobsen av Glyvrum, ið higartil hevur verið varamaður á tingi fyri Signar á Brúnni, er nú ikki longur løgtingslimur. Hann mátti lúta, nú fyrrverandi landsstýrismaðurin gjørdist løgtingsmaður.

Sambært grein í Dimmalætting í gjár, vildi Tórbjørn fegin offra tingsessin fyri, at Signar á Brúnni segði seg úr landsstýrissessinum.

Tórbjørn Jacobsen metir tað nevniliga vera ógvuliga týdningarmikið, at landsstýrismaðurin - hóast hann er floks- og samgongufelagi hansara - fer frá, tá frágreiðing vísir, at hann hevur brotið lógina.

Tórbjørn Jacobsen gjørdi greitt, at tað ikki ber til at fáa fullveldi, um tað ikki ber til at hava álit á embætisførsluni hjá landsstýrinum.

Misálit lá í luftini

Var Signar á Brúnni ikki í gjár áðrenn tingfundin komin við áheitan á løgmann um at verða loystur úr landsstýrissessinum, var væntandi, at hann kortini fór úr sessi sínum.

Umboð úr fleiri flokkum søgdu Sosialinum fyrrapartin í gjár, at tey ætlaðu at leggja misálit fyri løgtingið um Signar á Brúnni, varð eingin avgerð tikin á landsstýrisfundinum, um at hann fór frá.

Samband var millum fleiri av flokkunum fyrrapartin í gjár - eisini við nøkur av umboðum Tjóðveldisfloksins, og vóru hesi vís í, at eitt misálit á landsstýrismannin fór at fáa meiriluta.

Kortini var ikki vist, at tað fór at verða neyðugt at leggja misálit fyri løgtingið, sjált um Signar á Brúnni ikki sjálvur ynskti at verða loystur úr landsstýrissessinum.

Løgmaður segði nevniliga fyrrapartin í gjár, at málið mátti fáa avleiðingar áðrenn tað kom so mikið langt, at misálit varð reist í tinginum. Tískil gav hann greiðar ábendingar um, løgmaður sjálvur fór at taka neyðugu stigini, tók Signar á Brúnni seg ikki aftur sjálvur.

Seta kanningarstjóra

Signar á Brúnni metir seg ikki hava gjørt nakað skeivt, tá hann seinasta summar játtaði sjónvapinum pening uttan um fíggarlógina. Hann sigur seg hava handlað eftir ráðum frá løg- og búskaparfrøðingum bæði í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og uttan fyri húsið.

Tí hevur Signar á Brúnni kravt at fáa ein óheftan kanningarstjóra at kannað málið, so prógv fæst fyri, at hann ikki hevur framt nakað brot á lógina um ábyrgd landsstýrismanna.

Sambært løgmanni og varaløgmanni, verður kanningin sett í verk. Slík kanning kann væntast at fara at draga aðrar landsstýrismenn umframt embætisfólk upp í leikin. Tískil er neyvan seinasta orðið enn sagt í málinum.

Kanningin fer eisini at sýna okkum, hvørt tað eru løgtingsgrannskoðararnir, ið hava víst á lógarbrotini hjá landsstýrismanninum, ella tað er sjálvur landsstýrismaðurin, ið hevur uppiborið misálit.

Frá fyri at verja stýrisskipanina

Signar á Brúnni og Tjóðveldisflokkurin gjørdu í felag av, at landsstýrismaðurin skuldi fara frá, fyri at tryggja føroyingum álit á rættartrygdina

JOHN JOHANNESSEN

Fyrrverandi landsstýrismaðurin, Signar á Brúnni, og Tjóðveldisflokkurin samdust í gjár um, at Signar á Brúnni skuldi fara úr landsstýrissessinum, meðan málið um embætisførslu hansara verður viðgjørt av óheftum kanningarstjóra.

Høgni Hoydal vísir vegna flokkin á, at slíkar atfinningar, sum tær løgtingsgrannskoðararnir eru komnir við, ikki kunnu fara aftur við borðinum.

– Bert tað, at ivi er reistur umlógarbrot, er nóg mikið til, at fólk ikki hava álit á, at stýrisskipanin verður hildin. Og um slík mál ikki fáa avleiðingar og verða viðgjørd til fulnar, kann hetta fáa sera álvarsligar fylgjur fyri samfelagið, sigur Høgni Hoydal.

Ganga á odda

Sambært Høgna Hoydal eru Signar á Brúnni og Tjóðveldisflokkurin vorðin samd um, at flokkurin eigur at ganga á odda fyri at skapa álit og fyridømir fyri, at slík mál fáa ta viðgerð, ið setur greiðar linjur, hvat skal bera til hjá einum landsstýrismanni. Ábyrgdin skal staðfestast hjá landsstýrismanninum, fyrisitingini og øllum øðrum pørtum í slíkum málum.

Høgni Hoydal sigur seg við hesum rokna við, at gott fordømi er skapt fyri, hvussu slík mál frameftir kunnu fáa eina rættartrygga viðgerð, ið tryggjar at alt kemur fram og ábyrgdin verður staðfest. Somuleiðis væntar hann at fordømi er skapt fyri, hvussu ljós verður kastað á stýrisskipanarlógina og ábyrgd landsstýrismanna og hvussu álit verður skapt á stýrisskipanina

Tjóveldisflokkurin roknar eisini við at hava skapt fordømi fyri, hvussu vit tryggja, at slík mál ikki verða avgjørd gjøgnum ákærur og dómar í fjølmiðlunum, hvussu vit tryggja, at einstøk mál verða viðgjørd við grundarlagi í rættartrygdini á øllum økjum frameftir og hussu vit loysa slík mál í fullum opinleika við virðing fyri fólkaræðinum, løgtingi, landsstýrismonnum og fyrisiting teirra.

Landsstýrismaðurin ósekur

Tjóðveldisflokkurin stendur, eins og landsstýrismaðurin sjálvur, fast við, at Signar á Brúnni er ósekur í ákærunum frá løgtingsgrannskoðarunum.

Flokkurin sigur seg gjølla hava viðgjørt málið, og er hann komin til ta niðurstøðu, at tað er púra høpisleyst at misteinkja landsstýrismannin og leggja hann undir nakran persónligan áhuga í málinum.

Tað stendur greitt, at hetta er eitt mál, ið ikki eigur at brúkast sum ein heksajakt eftir landsstýrismanninum í undirvísingar- og mentamálum. Málið um roknskapin hjá sjónvarpinum hevur verið viðgjørt púra opið fyri almenningin og løgtingi. Somuleiðis hevur landsstýrismaðurin grundgivið fyri sínum avgerðum um, at hann var noyddur at gjalda lønir og skyldur hjá sjónvarpinum, tí annars hevði landskassin misrøkt sínar skyldur mótvegis triðjaparti, sigur Høgni Hoydal.